

SKRIVSTOVAN HJÁ **HØVUÐSBARNAVERNDAR-NEVNDINI** SØKIR EFTIR
**TVEIMUM FÓLKUM**
við hóskandi
**AKADEMISKUM FØRLEIKA**

KREA

Vit sóknast eftir tveimum fólkum, ið hava løgfrøðiliga ella aðra viðkomandi universitetsútbúgving til skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Talan er um eitt fast starv og eitt avloysarastarv vegna barnsburðarfarloyvi.

Nýggj barnaverndarlóg kom í gildi tann 1. januar 2006 og hevur hon ført við sær umsitingarligar og fyriskipanarligar broytingar á barnaverndarøkinum.

Uppgávan hjá skrivstovuni er at fyrireika mál og at tryggja, at málini eru nóg væl upplýst, áðrenn tey verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar, umframt at tulka løgfrøðilig ivamál, eisini at savna saman hagtøl um m.a. umsorganaryvitøkur, og í samstarvi við aðra deild á Almannastovuni at lýsa tørvin á stovnsplássum í Føroyum.

Í samstarvi við fíggjardeildina á Almannastovuni umsitur skrivstovan fíggjar-viðurskiftini viðvíkjandi lógarbundnum útreiðslum hjá Høvuðsbarnaverndini. Herumframt umsitur skrivstovan í samstarvi við fíggjardeildina á Almanna-stovuni fíggjarviðurskifti, sum eru tengd at virkseminum hjá Høvuðsbarna-verndarnevndini.

Í arbeiðinum kemur tú at hava tætt samskifti og samarbeiði við tær kommu-nalu barnaverndartænasturnar og barnaverndarstovnarnar undir landinum.

Tú verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, hevur góð samstarvs-evni, góð evni at orða teg skrivliga sum munnliga og hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan fyrisiting á almannaøkinum, men eingin treyt.

Tú verður sett/ur við tilvísing til Mariu Jacobsen, deildarleiðara á Stjórnar-skrivstovuni á Almannastovuni.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Mariu Jacobsen, deildar-leiðara, ella Biritu Viderø, fulltrúa, á tel. 35 35 10, 21 54 91 ella 21 54 78.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 22. mai 2008, kl. 12. Vinarliga merkið brævbjálvan "Høvuðsbarnaverndarnevndin".

Send umsóknina til:
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 309
110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

**Plakatirnar verða seldar á hesum Shellstøðum:**

- Við Ringvegin í Havn
- Á Frælsinum í Havn
- Í Gøtudali
- Í Klaksvík



# Ogna tær tína egnu **fótbóltshetju**

Vit selja eitt restlagur av fótbóltsplakatum fyri prísir, ið sparka




**Fótbóltsplakat**
Vanl. prísur 599,-
**Nú einans**
**100,00**

Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo | www.shell.fo